## Ikki við Villa

Hóast fagnaðurin hjá Spania var stórur í gjárkvøldið, so vóru eisini skár í gleðini. Stutt eftir dystarbyrjan noyddist David Villa nevnliga haltandi av vøllinum, og greitt er, at hann verður ikki við í finaldystinum móti Týsklandi. – Villa verður ikki við í finaluni. Talan er um eina forstrekning, og so er ikki hugsingur um, at hann verður við, staðfesti spanski landsliðsvenjarin, Luis Aragones, tá Spania hevði vissað sær finaluplássið. Higar til hevur David Villa verið besti málskjútti hetta EM-endaspælið.



## Barcelona vil hava Arshavin

Zenith St. Petersburg váttar nú, at Barcelona hevur boðið upp á Andrei Arshavin. Seinastu mánaðirnar hevur Arshavin við frálíkum avrikum í UEFA-Cup kappingini og í EM-endaspælinum gjørt vart við síni fótbóltsevni, og tað fingið fleiri europisk stórfeløg at vísa honum áhuga. Arshavin, sum er 27 ár, hevur áður sagt, at júst Barcelona er stóri dreymurin á fótbóltsyrkisleiðini.



*David Silva hevur júst skorað triðja spanska málið, og Spania líkist nú einum stórfavoritti til heitið sum nýggjur europameistari í fóbólti*

# Russland stóð ikki royndina

**Spaniólar høvdu tolið, sum skuldi til, so russiska kontramaskinan ongantíð slapp ígongd. Og so gjørdist talan um enn ein tryggan sigur hjá Spania, sum nú av álvara líkist einum nýggjum europameistara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bert einaferð – í 1964 – hevur Spania vunni ðEM-heitið í fótbólti, men avrikini í endaspælinum hesa ferð hava av álvara givið ábendingar um, at hetta kanska er árið hjá Spania.

Næst seinasta forðingin var í gjárkvøldið, tá Spania dystaðist við Russland. Bæði liðini hava sýnt framúr álopsspæl í endaspælinum, men fyrra hálvleik var tó lítið at síggja til hetta. Spania hevði kanska lítla yvirvág í spælinum, men teir tordu ikki av álvara at tveita fólkið fram á grøna talvborðinum. Og hinvegin sást lítið til russiska álopsspælið, sum annars hevur verið so eyðsýnt. Arshavin varð sera væl ansaður, og í aðrar mátar tordu russar eins illa sum spaniólar at flyta fólkið fram, og tí gjørdist talan í longum løtum um taktiskar bíðistøður.

Opningurin kom eftir steðgin. Bert fimm minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, tá Iniesta royndi seg við skoti. Hetta hevði ikki beina kós, men Xavi hevði sæð møguleikan, og so tveitti hann seg fram í skotbanan, so kúlan fór sendandi í meskarnar.

Og so var mótbrekkan tung hjá Russlandi. Teir royndu at flyta fólk fram, men móti tekniskt sterku spaniólunum var hetta ein vónleys uppgáva. Ferð eftir ferð varð bólturin fluttur skjótt runt, soleiðis at trýstið frá mótstøðuni var burturi, og so kundi spanska maskinan av álvara kickstarta. Eftir 73 minuttum kundi Guiza økja til 2-0, og tá Silva í 82. minutti sendi triðja bóltin inn um Akinfeev, var hetta bert ein staðfestin av veruleikanum. Ein veruleiki, sum sigur, at Spania í løtuni hevur kanska best spælandi fótbóltslandsliðið av øllum í Europa.

Um hetta so eisini røkkur í finaluni, kann bert tíðin vísa. Og skuldi nakar ivast, so byrjar avgerðin um hetta sunnukvøldið klokkan 19.45.

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 12 | 10 | - | 2 | - | 0 | 29 | 11 | 18 | 32 |
| 2 HB | 12 | 6 | - | 4 | - | 2 | 24 | 10 | 14 | 22 |
| 3 B36 | 12 | 5 | - | 6 | - | 1 | 15 | 6 | 9 | 21 |
| 4 NSÍ | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 18 | 13 | 5 | 21 |
| 5 Víkingur | 12 | 4 | - | 3 | - | 5 | 18 | 15 | 3 | 15 |
| 6 KÍ | 12 | 3 | - | 5 | - | 4 | 16 | 20 | -4 | 14 |
| 7 B68 | 12 | 4 | - | 2 | - | 6 | 9 | 17 | -8 | 14 |
| 8 ÍF | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 15 | 25 | -10 | 11 |
| 9 Skála | 12 | 1 | - | 5 | - | 6 | 8 | 20 | -12 | 8 |
| 10 B71 | 12 | 1 | - | 2 | - | 9 | 11 | 26 | -15 | 5 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB/S | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 33 | 8 | 25 | 31 |
| 2 07 Vestur | 12 | 9 | - | 1 | - | 2 | 52 | 19 | 33 | 28 |
| 3 TB | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 37 | 10 | 27 | 26 |
| 4 AB | 12 | 8 | - | 1 | - | 3 | 43 | 16 | 27 | 25 |
| 5 HB | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 20 | 14 | 6 | 16 |
| 6 Víkingur | 12 | 4 | - | 3 | - | 5 | 16 | 29 | -13 | 15 |
| 7 KÍ | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 18 | 39 | -21 | 13 |
| 8 NSÍ | 13 | 2 | - | 3 | - | 8 | 22 | 41 | -19 | 9 |
| 9 EB/S | 13 | 3 | - | 0 | - | 10 | 12 | 55 | -43 | 9 |
| 10 B68 | 12 | 2 | - | 0 | - | 10 | 14 | 36 | -22 | 6 |

## Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 28.06 | NSÍ-B36 | Ransin N. Djurhuus |
| 29.06 | Víkingur-EB/S | Eiler Rasmussen |
| 29.06 | B71-KÍ | Rúni Gaardbo |
| 30.06 | B68-Skála | Ransin N. Djurhuus |
| 02.07 | ÍF-HB | Lars Muller |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 27.06 | B68-NSÍ | Jón Kári í Brekkuni |
| 28.06 | AB-VB/S | Høgni Hansen |
| 28.06 | TB-Víkingur | Páll Augustinussen |
| 28.06 | KÍ-HB | Petur Reinert |
| 28.06 | EB/S-07 Vestur | Rói Jacobsen |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 29.06 | KÍ-VB/S | Andreas Josephsen |
| 29.06 | B36-Skála | Bent T. Linklett |
| 29.06 | Víkingur-AB | Jákup M. Kjell |
| 02.07 | Skála-KÍ | Marner Olsen |